## Almennur fundur um tinnitus

Dagarnir 3.-6. juni skipar Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum fyri evnisdøgum, har evnið er tinnitus. Felagið hevur í hesum sambandi fingið vitjan av umboðum fyri feløgini fyri hoyribrekað í hinum norðurlondunum. Annað hvørt ár verða evnisdagar hildnir, og í ár verða teir hildnir í Havn.

Í hesum sambandi verður ein almennur fundur um tinnitus, har limir í svenska og norska hoyrifeløgunum fara at halda fyrilestrar. Fundurin verður í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 4.juni kl 16.

Tað eru serliga tónleikarar og ungfólk, ið lurta nógv eftir hørðum tónleiki, ið verða rakt av tinnitus, men eisini onnur, ið dagliga eru í nógvum larmi t.d. pedagogar og maskinfólk, verða rakt. Um tú hevur fingið tinnitus, slepst ikki av við tað aftur, tískil er fundurin sera viðkomandi fyri tey, ið eru í vandabókinum.

**eys**

## H71 til Dronninglund Cup

Í sambandi við, at gentur og dreingir 16 hjá H71 skulu til Dronninglund Cup í summar, fara tey at skipa fyri ymsum spennandi tiltøkum í vikuskiftinum.

Leygardagin 5. Juni verður tombola í FK í Hoyvík. Sunnudagin 6. Juni verður skipað fyri bingo í Pálsstovu og í næstum fara børnini eisini, saman við foreldrunum, at ganga hús úr húsi st spyrja fólk, um tey hava fløskur at lata.

Tey hava longu arbeitt dúgliga fyri ferðini, m.a. hava tey runddað stóra økið niðanfyri FK í Hoyvík, hjálpt til í hondbóltsgallaveitsluni og savnað fløskur.

Dronninglund er annars stóra ungdómshondbóltsstevnan í Danmark, og fleiri ferðir áður hava føroysk ungdómslið luttikið í júst hesi kappingini, har tað eisini koma onnur ung úr øllum heiminum.

**eys**

## Mentanarnátt í Havnar kirkju

Fríggjakvøldið 4. Juni kl 21 verður í sambandi við mentanarnáttina, ein klarinettkonsert í Havnar kirkju. Tey, ið fara at spæla eru øll í aldrinum 13-19 ár og eru úr Fuglafirði og Havnini.

Tað verður ein fjølbroytt ská, við europeiskum tónleiki, klassiskum, fólkaløgum og einum verki eftir Archangelo Corelli, har Mia Káradóttir spælir solo.

**eys**

# Special Olympics lið í Aalborg



*Special Olympicsliðið, ið hósmorgunin fór av landinum at kappast. Tey skulu luttaka í renning og svimjing*

Hóskvøldið 3. Juni fór eitt special Olymics lið av landinum, fyri at luttaka í Special Olympics Nordic Games, sum verður í Aalborg 4.-6. Juni.

Tríggir av føroyingunum skulu luttaka í renning. Tey eru Meiken Olsen, Júst í Túni og Tórur Hjalt Jacobsen.

Í svimjing skulu fýra føroyingar luttakarar kappast. Tey eru Halla Poulsen, Eyðdis á Løgmansbø, Magnus Vatnhamar Olsen og Petur Zachariassen.

Við á ferðini eru Haldóra Holm og Sonni Djurhuus. Føroysku Special Olympics liðini plaga at standa seg væl og koma aftur við medaljum.

Mánadagin koma tey aftur, so tá fáa vit at síggja hvussu hevur gingist teimum.

**Eys**

## Íslendskt kór í Føroyum

Í hesum døgum er kórið Tingeyinga kórinn í landinum. Hetta er eitt íslendskt kór, við uml. 40 sangarum, og tey fara at hava tríggjar framførðslur ímeðan tey eru her.

Ein, ið syngur við í kórinum er føroyingur, men sum skilst er hann ikki við vegna sjúku.

Ferðin hjá íslendingunum í Føroyum er í komin í lag í samstarv við kórið í Gøtu og Sólarmagn av Velbastað, sum tey eisini fara at syngja saman við á framførslunum.

Fyri kortum høvdu tey bæði føroyksu kórini konsertir saman, bæði í Gøtu og á Velbastað, og hesuferð hava tey so víðkað samstarvið við íslendska kórið. Fyrstu ferð, tey fara at syngja, verður mentanarnáttina 04. Juni. Tá verða tey í SMS, har tey syngja á torginum kl 23.

Leygardagin kl 17 syngja tey í Kirkjubøar kirkju, og sunnudagin kl 16 verður seinasta konsertin í Gøtu kirkju.

Skráin verður fjølbroytt, tað verða bæði íslendskir, føroyskir og enskir sangir á skránni.




petur & petur • 320870

Blómubindari ella fólk við áhuga fyri slíkum

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv í einum dynamiskum umhvørvi. Tú kemur m.a. at taka tær at gera blómutyssi, blómuprýði, brúðarbukettir og dekoratiónir.

Vit vænta, at tú:
- ert ágrýtin
- hevur hug og hegni at veita kundum okkara eina góða tænastu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- ert álítandi og fyrikomandi

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 3. juni 2004.

Umsóknir skulu sendast til:
Fípan
Postboks 1059
110 Tórshavn
Att: Jacob Rummelhoff

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.
Fyrispurningar um starvið kunnu setast til Jacob Rummelhoff á tel. 31 30 11.



Goymslufólk
til Miklagarð í SMS

Miklagarður í SMS søkir eftir einum goymslufólki at byrja skjótast tilber. Vit vænta, at viðkomandi er arbeiðssamur, ágrýtin og røkin. Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur trukk-koyrikort.

Talan er um eitt fulltíðarstarv. Løn sambært galdandi sáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn til: Miklagarður, Postboks 1069, 110 Tórshavn, att: Johnny Priess.
Tað ber eisini til at ringja til Johnny á tel 31 30 11 og hoyra nærri um starvið.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1700 fermetrar og við meira enn 10000 vørunummrum. Í Miklagarði starvast 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11




# Danmark er í ferð við at taka loysing frá Føroyum

**– Heldur hendan gongdin fram, kunnu Føroyar enda sum ein samantøvd, ullint hosa, mitt í ongamannalandi, sigur Høgni Hoydal, fólkatingsmaður**

RÍKISFELAGSSKAPURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Danmark eru í ferð við at loysa frá Føroyum.

Í orðaskiftinum á fólkatinginum hósdagin, hevði Høgni Hoydal vent fullveldisstríðnum á høvdið.

– Føroyska fullveldið er á bíðilista. Men afturfyri eru danir í fullari ferð við at loysa, bæði frá føroyum og Grønlandi, segði hann.

Hann vísti á at Danmark hevur gingið sína egnu kós í krígnum við Irak, hóast bæði Føroya Løgting og landstingið í Grønalndi hava samtykt at vera ímóti einum kríggi, sum ikki hevur undirtøku í ST.

– Hetta er ikki javnrættur og hetta er ikki fólkarættur, segði Høgni Hoydal

Men hann segði, at tað hevði enn størri týdning, at Danmark knýtir seg fastari og fastari at ES, samstundis sum Føroyar og Grønland standa uttanfyri.

Og nú skulu danir allarhelst eisini atkvøða um eina ES grundlóg, sum miðsavnar enn størri vald í ES.



*- Danir eru í fullari ferð við at loysa frá Føroyum og Grønlandi. Men tað skal ikki standa á at lata teir fáa eina hóskandi skiftistíð, segði Høgni Hoydal á fólkatingi hósdagin*

### Sum ein ullint hosa

Hann segði, at hann stúrdi tí fyri, at Føroyar kunnu koma at liggja sum ein samantøvd ullint hosa mitt í Atlantshavi, ella mitt í ongamannalandi, bæði sum ein útjaðari í danska ríkinum og sum ein útjaðari í ES.

Hann sigur, at ongin hevur spurt Føroyar og danir eftir, hvørja støðu, hesir báðir partarnir í ríkinum hava.

– Hóast nógv danskt prát um javnbjóðis partar í ríkinum, hava danir ikki enn viðurkent, at vit hava sjálvavgerðarrætt í altjóða spurningum og danir hava heldur spurt okkum um okkara støðu í hesum máli og vit eru í ongamannalandi við ongari atkvøðu í ST, ongari atkvøðu í ES og vit hava ikki ein sjálvstøðugan búskap.

– Hesin trupulleikin kann loysast við at danska stjórnin viðurkennur, at Føroyar og Grønland hava tey rættindi, sum ST ásetir, at allar tjóðir hava.

– Øðrumegin siga danir, at føroyingar og grønlendingar hava sjálvavgerðarætt. Men hinumegin vilja teir ikki viðurkenna, at hendan sjálvavgerðarrættin í altjóða viðurskiftum.

Høgni Hoydal sigur, at higartil hevur tað verið so, at tey, mál, sum danska stjórnin hevur latið upp í hendurnar á ES, eru mál, sum Grønland og Føroyar umsita sjálvi: Handils- og umhvørvispolitikk o.a.

Men nú ES grundlógin verður sett í gildi, verður somuleiðis føroyskur uttanríkispolitikkur, verjupolitikkur, gjaldoyrapolitikkur og rættarpolitikkur, flutt til Brússel,tí danir siga fyrivarnini á hesum økjum frá sær

– Og alt hetta hendir, uttan at føroyingar og grønlendingar eru spurdir og tað er ikki í samsvari við fólkaræðið.

– Vit kunnu saktans hugsa okkum tað merkiligu støðu, at vit liggja mitt í atlantshavi við donskum uttanríkispolitikki, verjupolitikki, eini danskari krónu og einum donskum rættarpolitikki, samstundis sum Danmark sjálvt hevur flutt øll hesi øki til Brússel.

### Skulu fáa hóskandi skiftistíð

Føroyski Fólkatingsmaðurin sigur, at sostatt er Danmark í ferð við at loysa frá Føroyum og Grønlandi.

– Men vit geva fegnir dønum eina hósakndi skiftistíð, legði hann afturat.

– Hví ber tað ikki til at flytasjálvavgerðarrættin á hesum økjum til Føroyar og Grønland, tá ið tað ber til at flyta hann til Brússell, spurdi hann.

Kortini fegnaðist hann um, at Anders Fogh Rasmussen hevði tikið undir við einum brævi frá Lars Emil Johansen um gera einaohefta kanning av, hvørja ávirkan tað fer at fáa fyri Føroyar og Grønland, at danir kanska fara at samtykkja eina ES grundlóg og at teir harafturat siga tey fýrafyrivarnini um uttanríkismál, verjumál, gjaldaoyramál og rættarmál, frá sær.

– Vit viðurkenna sjálvsagt, at danir hava fullan rætt til at føra ES politikk. Men sostatt átti danska stjørnin eisini at viðurkent rættin hjá føroyingum og grønlendingum at fari eina aðra kós.

# Ríkisstuðulin til Føroya setast í grunn

**Á fólkatingi hósdagin reisti Høgni Hoydal spurningin um at seta blokkstuðulin í ein grunn, sum skal stuðla útbúgving, gransking og øðrum tiltøkum, sum bera framímóti sjálvbjargni**

RÍKISSTUÐULIN
*Áki Bertholdsen*
*ak@sosialurin.fo*



*Norðuratlantsbólkurin fer nú at seta eina nevnd av serfrøðingum at kanna eftir, hvussu vit kunnu gerast meiri búskaparliga óheft av dønum, segði Høgni Hoydal á Fólkatingi hósdagin*

– Danski ríkisstuðulin til Føroya hevur verið brúktur til at gera okkum meiri heftar av Danmark. – Men vit eiga at venda byttuni og spyrja: Hvussu kann hann brúkast til at gera okkum meiri sjálvbjargin.

Hendan spurningin reisti Høgni Hoydal, fólkatingslimur, í orðaskiftinum á Fólkatingi hósdagin.

Hann vísti á, at ein loysn kundi verið at blokkurin varð settur í ein grunn, sum skuldi markast til at stuðla gransking, útbúgving og øðrum menningarætlanum, sum førdu fram ímóti sjálvbjargni.

Høgni Hoydal vísti á, at í løtuni sær út til, at føroyska fullveldismálið stendur á bíðilista.

Men hann staðfesti eisini, at tað er ein sannroynd, at største forðingin fyri at fullveldisstríðið í Føroyum og Grønlandi, kann halda fram, er tað búskparliga haft, sum blokkurin bindur hesar báðar partarnar í ríkinunum at Danmark við.

Hann sipaði eisini til ráðstevnuna, sum Norðuratlantsbólkurin helt á Christiansborg í farnu viku har m.a. spurningurin varð reistur, hvat danir fáa burturúr blokkstuðlinum til Grønland og Føroya og um tað er ynskiligt at varðveita hesa støðuna, sum ger báðar ríkispartarnar heftar at Danmark.

Sjálvur segði Høgni Hoydal, at ongin ivi er um, at eisini Danmark fær nakað burturúr støðuni, sum hon er nú.

Men hann helt eisini, at tað ber til at siga, at danir betala fyri at varðveita yvirvøldina í Norðuratlantshavi og tað helt hann, at danska stjórnin skal viðurkenna og at royna at fáa eitt kjak í lag á jøvnum føti.

Høgni Hoydal vísti eisini á, at á ráðstenvuni hevði ein fólkatingsmaður spurt um ikki blokkurin kann brúkast til at skapa sjálvbjargni, heldur enn at skapa tað øvugta.

Og júst hendan spurningin fer Norðuratlantsbólkurin nú at taka upp til viðgerðar.

Høgni Hoydal segði, at Norðuratlantsbólkurin fer nú at seta sein bólk av serfrøðingum at lýsa búskaparligu viðurskiftini ímillum Danmark og Føroyar og ímillum Danmark og Grønland. Somuleiðis skal bólkurin vísa á gongdar leiðir fyri at fáa ein sjálvberandi búskap í Føroyum og í Grønlandi.

- Vit fara eisini at spyrja landsstýrið í Føroyum og í Grønlandi, um tey eru sinnað at vera við í eini slíkari ætlan.